Vikuskiftis Sosialurin

Nr. 203 - 19. oktober 2007

# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Víðgongdar kreftir royna at forða fyri, at pakistanar kunnu velja síni umboð á demokratiskan hátt*

*(Hvítu Húsini)*

# Evropa skal nýskipast

**Teir 27 ríkis- og stjórnarleiðararnir í ES-londunum samdust í morgun um ein nýggjan ES-sáttmála**



*Væl nøgdir ríkis- og stjórnarleiðarar í Lissabon í morgun. Frammanfyri síggjast franski forsetin Nicolas Sarkozy, portugisiski forsætisráðharrin José Socrates og polski forsetin Lech Kaczynski. Aftan fyri teir eru Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, ungarski forsætisráðharrin Ferenc Gyurcsamy og írski forsætisráðharrin Bertie Ahern*

- Hetta er einki minni enn eitt bragd, sum er fingið í lag í tí rætta evropeiska andanum, segði formaðurin í ES-nevndini, José Manuel Barroso, í morgun, tá tað var greitt, at semja var um tann nýggja sáttmálan.

Av ringum royndum er orðið grundlóg er ikki nevnt í nýggja sáttmálanum, og tann nýggi sáttmálin vísir eisini frá tí grundlógaruppskotinum, sum fransmenn og niðurlendingar vrakaðu á fólkaarkvøðu í 2005.

Nýskipanarsáttmálin ber í stuttum í sær, at ES fær ein fastan formann og ein felags uttanríkisráðharra, sum tó ikki fær heitið ráðharri. Evropatingið fær størri ávirkan, ES-nevndin verður skerd, og sýtingarrætturin verður avtikin so við og við.

Nakrir meinbogar vóru, áðrenn tað eydnaðist at fáa endaliga semju í morgun. Eitt nú vildi Italia ikki góðtaka, at landið skuldi hava færri umboð í Evropatinginum enn Bretland og Frakland. Úrslitið varð, at landið fekk eitt umborð afturat.

Danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, var sera væl nøgdur við úrslitið av fundinum í Lissabon.

- Vit eru væl nøgd við úrslitið, sum er komið burturúr, tí nú kunnu vit brúka okkara politisku orku til at fáa politisk úrslit, segði forsætisráðharrin aftan á samráðingarnar.

Tað er ikki greitt, um danir skulu hava fólkaatkvøðu um nýggja sáttmálan.

# Tann væntaða móttøkan

**Al-Qaeda hevði lovað at beina fyri Benazir Bhutto, tá hon setti fótin aftur á pakistanska jørð. Drápsroyndin miseydnaðist, men 126 onnur lótu lív**

Viðhaldsmenn og trygdarmenn kvikaðu sær at hjálpa Benazir Bhutto úr bilinum og burtur frá staðnum, tá tvær sterkar bumbur vóru brostnarminni enn tjígu metrar frá bilinum hjá fyrrverandi forsætisráðharranum.

Allastaðni lógu lík og særd fólk, og talið á deyðum vaks skjótt. Ta fyrstu løtuna ljóðaði, at meiri enn 20 høvdu latið lív. Men seinni í gjárkvøldið fór talið upp um 80, og í morgun kunngjørdu pakistonsku myndugleikarnir, at bumbuatsóknin í Karachi hevði kravt 126 mannalív, og at umleið 240 fólk høvdu fingið skaða. Lagt varð afturat, at Benazir Bhutto hevði ikki fingið nakað mein av atsóknini, og at hon var á einum tryggum staði.

Eygleiðarar í Pakistan siga, at bumbuatsóknin kom ikki óvart á myndugleikarnar. Herfyri kunngjørdi al-Qaeda, at felagsskapurin fór at beina fyri Benazir Bhutto, so skjótt hon setti fótin aftur á pakistanska jørð. At pakistonsku myndugleikarnir tóku ávaringina í álvara sást í gøtunum í Karachi í gjár, har meiri enn 20.000 hermenn og løgreglumenn skuldu forða ófriði.

USA stjórnin fordømdi í morgun bumbuatsóknina í Karachi. Talsmaðurin hjá Hvítu Húsunum, Gordon Johndroe, segði atsóknina vera eina staðfesting av, at víðgongdar kreftir royna at forða fyri, at pakistanar sleppa at velja síni umboð á ein demokratiskan hátt.



*Undir einum skelti við orðunum „Leingi livi Bhutto“ savnaði løgreglan líkini av teimum, sum doyðu í bumbuatsóknini*

## STUTT SAGT

## Verri viðurskifti við turkar

Amerikanski verjumálaráðharrin, Robert Gates, heldur, at viðurskiftini millum USA og Turkaland hava fingið stóran skaða av, at Kongressin í Washington hevur samtykt eina fráboðan um, at turkar framdu fólkadráp ímóti armenum undir fyrra heimsbardaga. Ja, skaðin er kanska so stórur, at hann bøtist ikki aftur, segði Robert Gates í gjár. George W. Bush, forseti, hevur eisini ávarað Kongressina ímóti at samtykkja fráboðanina.

## Innflytari ráðharri

Fyri fyrstu ferð hevur ein innflytari fingið ráðharrasess í Noregi. Tað hendi í gjár, tá Jens Stoltenberg, forsætisráðharri, kunngjørdi, at Manuela Ramin Osmundsen var vorðin ráðharri og skuldi umsita barnamál og javnstøðumál. Manuela Ramin Osmundsen, sum er útbúgvin løgfrøðingur, er fødd á fronsku oynni Martinique, og hon var franskur ríkisborgari til fyri 14 døgum síðani, tá hon fekk norksan ríkisborgararætt. Noreg fekk tveir aðrar nýggjar ráðharrar í gjár, og av teimum trimum nýggju eru tvær kvinnur.

## Tvíburðar fingu ein frammaná

Bara tveir dagar undan tjóðartingsvalinum í Póllandi hava tvíburðarnir Lech og Jaroslaw Kaczynski, sum eru ávikavist forseti og forsætisráðharri, mist ein av teimum týdningarmestu politisku stuðlunum. Fyrrverandi forsætisráðharrin Kazimierz Marcinkiewic boðaði í gjár frá, at hann er farin burtur úr konservativa flokkinum hjá Kaczynski-tvíburðunum. Politiskir eygleiðarar í Póllandi siga, at fráboðanin kemur tvíburðunum illa við nú so stutt undan valinum sunnudagin.